# TILTØK

**Gudstænastur**
**Leygardagin 4. des.**
*Havnar kirkja:* kl. 14 Deyvagudstænasta Jónsvein Bech

**Sunnudagin**
**2. sunnudag í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 15, Barnagudstænasta. Børnini fáa pakka, Heri Joensen
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., skriftamál kl. 11.40, kl. 15 Barna- og familjugudstænasta, Jóannis Fonsdal
*Kvívík:* kl. 12, (skriftamál kl. 11.50), altarg., Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 12, lestur
*Ritúvík:* kl. 19, »Teir sjey lestrarnir« (liturgisk gudstænasta), Meinhard Bjartaíð
*Gøta:* Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Skála:* kl. 11
*Sjóvar kirkja:* kl. 12.10, (Kórið hjá Jóhan Mortensen syngur), Jógvan Fríðriksson
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs
*Norðskála:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa.
*Mánadagin kl. 19.30* Musikandakt við Sundakórinum
*Oyndarfjørður:* kl. 12, Bjarni Bæk, dómpróstur
*Elduvík:* kl. 12, John Myllhamar
*Eiði:* kl. 17, ljósgudst., Emil Olsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Mogens Tilsted Christensen
*Húsar:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Hvannasund:* altarg., Elsa Funding
*Bøur:* kl. 12, David Johannesen
*Fámjin:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech. (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sandvík:* kl. 18 Ólavur Rasmussen
*Vágur:* kl. 11,
*Leiti:* kl. 12.15, Patrick de Neergaard
*Skúvoy:* kl. 12, Jákup Reinert Hansen

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsvegur 75*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jákupi Reinert Hansen presti. Evnið: Arbeiðið við lestrunum hjá Jákupi Dahl.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 15 Jóláitriv fyri alla familjuna (tilmelding 421747 ella 312189).
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Hetta er síðsta møti hesuferð, har major Njál Djurhuus talar.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Fríkirkjan Oasan**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Magnus Simonsen, evnið: Trúboðarar, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti í fríkirkjuni Oasan.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Alex O'Campo, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Sam Jakobsen, evnið er: »Eitt praktiskt kristnilív í familjuni« 1. partur, kl. 18 Møti við luttøku úr Saron í Vestmanna.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michal Bienkowski, presti í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur.
Sunnudagin kl. 15 Jólafest, børn undir skúlaaldur, kl. 18 Jólafest, børn í skúlaaldri.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Reflex skipar fyri. Á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um »Týdningurin av einum – Martin Luther«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
www.livdin.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 Møti, har Poul Færø úr Klaksvík talar.
www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 14 Junior, kl. 18 Møti v/ Niels Jacob Nielsen.

**Nazaret, Kaldbak**
Á bønar- og uppbyggingarmøtinum 7. des. greiða Símun Ósá og Óli Steinberg frá arbeiðinum í Grønlandi, har teir virka sum trúboðarar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Vikuskiftismøtir verða leygarkvøldið kl. 19 við luttøku av Palla Højgaard við talu og Hjalgrím Davidsen sum kemur at enda, Jens Lisberg og fleiri koma at syngja.
Sunnukvøldið kl. 17.30 Møti við Palla Højgaard sum talara, Elisabeth Olsen kemur at enda, ung úr skopun og mansbólkurin úr missiónshúsinum og fleiri koma at syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11 við breyðbróting.
Mánadagin hevur ungdómsarbeiðið hugnaløtu kl. 20.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Jólahugni verður fyri børn í skúlaaldri í Meinigheitshúsinum í Sandavági týskvøldið kl. 19.00. Á skránni verður jólaábit, skemt, spøl, sangur o.a. Øll børn í skúlaaldri eru hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Sangløta við felagssangi og luttøku av Streingjakórinum. Aftaná kaffi og rís'a'lamande.

**Kedron, Sørvágur**
Møtir verða hóskvøldið, fríggjakvøldið, leygarkvøldið kl. 20 og sunnudkvøldið kl. 17 við Poul Færø og John í Skemmuni, Ólavur á Váli syngur. Kom og hoyr spennandi boðskap.

**Aglow, Vágar**
Jólamøti við Jastrid og Paula Høj verður 4. desember kl. 20 í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági. Øll eru vælkomin, bæði kvinnur og menn.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Asger Jensen, Streingjakórið syngur. Innsavnan.
Mánakvøldið kl. 19.30 eru øll vælkomin til jólahugna. Amaliel og Simony Knudsen tala og syngja. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Æðuvík**
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ John S. Myllhamar.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Anniku Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Tabor, Toftir**
Dekoratiónskvøld verður í kvøld kl. 18.00. Vit fara at gera dekoratiónir og bera tær út til fólk í bygdini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl. 20. Asger Jensen frá Bornholm luttekur á møtinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Norðskála**
Jólahugnin hjá sunnudagsskúlanum við Norðskála verður í kirkjuni sunnudagin 5. desember kl. 15.00. Øll eru vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Kristian Joensen talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 11 verður Lestur, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har Harriet Lamhauge, Lamba, talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Barnakórið venur kl. 15.15, kl. 18 Møti, har ung skipa fyri.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti, kl. 21 Ungdómsmøti v/ Sverra Kass.
Mikukvøldið kl. 20 Bíblíutími. Verið øll vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Ungdómsnevndini, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Jólahugni í sunnudagsskúlanum, kl. 18 Møti v/ Jens og Malene Meitilberg. Hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við luttøku av ungdómi frá Soli Deo Gloria. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6. fl. Kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Jólahugni verður í Samljóð leygardagin kl. 19.00. Birgit og Svenning av Lofti luttaka. Kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Vælkomin til jólahugna mikudagin 8. desember kl. 18. Góður matur er at fáa, ymiskt til gaman og álvara. Tilmelding og kostnaður á tlf. 361204 og 269998.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn, Annika Jørgensen, Sørvágur og Magni Reinert, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til teirra stóra dag, verða biðin um at tekna seg á tlf. 212480, 216185 ella 220145 áðrenn 5. desember.

## 70 ÁR

Tann 7. desember fyllir Fríborg Petersen úr Klaksvík 70 ár. Dagurin verður hildin í hølum Húsmøðrafelagsins í Bøgøtu 3 leygardagin 4. desember.

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 7. desember hava Jákup Eli og Ingrid Steffensen í Klaksvík gullbrúdleyp. Tey vera burturstødd.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Og hetta eiga tit tess heldur at gera, sum tit vita tíðina, at tað longu er tíð hjá tykkum at vakna úr svøvni!*
*Róm. 13,11*

Vit eru í adventini. Og adventin er ein fyrireikingartíð til jólini, eins og føstan er fyrireikingartíð til páskirnar. Vit liva nú í vón og væntan um, at frelsarin kemur. Hann kemur við kærleika, umsorgan og náði. Og hann kemur við frelsu til heimin. Tað er Jesus, Guds sonur, sum kemur.

Alt vísir fram móti jólagestinum. Nú kemur hann bátt.

Í grundini kemur frelsarin hvørja ferð, vit savnast í kristna felagsskapinum. Náðin er nýggj á hvørjum degi. Vit kunnu ikki annað enn fagna adventsdrottinum. Vit kunnu ikki annað enn trúgva á hann. Vit liva hvønn dag í vón og væntan. Vit kunnu ikki annað sum kristin enn liva í vónini um, at frelsarin kemur. Hann kemur í orði og sakramentum. Kirkja okkara hevur til upopgávu at boða orðið um hann, sum kemur.

Profetarnir í gomlu pakt hava talað um hann. Nú kemur hann og hann kemur sum hin eyðmjúki Harrans tænari. Hann ríður inn í Jerusalem á einum ásini. Hann ríður ikki á einum hesti, sum er stríðsdjórið. Nei, hann er Gud og menniskja í einum persóni. Hann er Guds svar til heimin. Guds svar til ein kaldan og avskeplaðan heim. Hann er hitt sanna ljósið, sum upplýsir hvørja menniskju. Tað er hann, vit savnast um. Nú kemur hann og hann kemur nú á serligan hátt í kristna felagsskapinum.

Vit kunnu ikki annað enn fagna honum. Vit kunnu ikki annað enn trúgva á hann. Og at trúgva er at eigalívið og framtíðina. Og tað er at hava lut í jólagleðini.

Adventsdrotturin kemur. Hann vil læra okkum at liva lívið her og nú í trúgv, vón og kærleika, og hann vil geva okkummót uppá lívið, so øll tilvera okkara verður signað av Gudi. Frelsarin er her, hanne r tær nær, hanne r í hjarta tínum. Tak hann uppá orðið. Og at taka hann uppá orðið er at trúgva, elska og vóna. Alt hetta ført tú sum gávu, tá tú hoyrir orðið í kistna felagsskapinum. Kenn títt pláss har. Har fáa vit mál, móti og mið fyri lívi okkara. Har frá vit frelsu Guds!

Amen.

**David Johannesen**